# Fulltrúi til Almanna- og heilsumálaráðið

**Eitt starv sum fulltrúi í Almanna- og heilsumálaráðnum er leyst at søkja til setan 1. august 2008, ella eftir nærri avtalu.**

KREA



## Um starvið

Talan er um eitt starv á heilsupolitisku deildini, har tú kemur at ansa eftir, og hava umsjón við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands og at ráðgeva um fíggjarviðurskifti og onnur fyrisitingarlig viðurskifti í hesum sambandi. Harumframt kemur tú at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Almanna- og heilsumálaráðið.

Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í sambandi við, at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

Starvið er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við hini starvsfólkini á deildini. Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

## Førleikakrøv

Viðkomandi búskaparfrøðilig, ella samfelagsfrøðilig útbúgving frá hægri lærustovni, ella drúgvar royndir frá almennari umsiting. Góðan teldukunnleika, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum og hagtølum.
Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur.
Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

## Lønar- og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið ella starvsmannafelagið samsvarandi royndum.

Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð. Tann sum settur verður, má kunna tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum og starvsstaðnum.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO-100 Tórshavn.

## Nærri upplýsingar

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50, ella teldupost: turid@ahr.fo.

## Umsóknarfreist

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 4. juli 2008, kl. 12:00.

**ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ**

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo

# Vilt tú við á okkara lið?



## Tryggingarfelagið Føroyar sóknast eftir dugnaligum starvsfólki til avbjóðandi starv á Starvsfólkadeildini.

Tryggingarfelagið Føroyar stevnir við fullari ferð móti avbjóðingum á altjóða støði. Til at røkka høgu málum okkara er neyðugt við eini vælvirkandi starvsfólkadeild, sum, umframt at standa fyri dagligu starvsfólkafyrisitingini, kann skipa førleikamenningina av okkara 110 starvsfólkum, so tey eru klár til komandi avbjóðingar.

### Arbeiðsøkið og uppgávur

Starvsfólkadeildin hevur ábyrgdina av:
- Starvsfólkapolitikki og umsiting
- Samskipanin av starvsfólkamenning og útbúgving innanhýsis í felagnum.
- Lønarumsiting

Á Starvsfólkadeildini starvast umframt leiðaran eitt annað starvsfólk fulla tíð, og kundarnir hjá deildini eru øll starvsfólkini í felagnum. Arbeiðsuppgávurnar hjá tær verða skipaðar eftir áhuga og førleika innan uppgávuøkið hjá Starvsfólkadeildini.

### Vit kundu hugsað okkum, at tú:

- hevur viðkomandi útbúgving, royndir og hug at arbeiða innan starvsfólkaøkið
- ert tænastusinnað/-ur, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
- dugir væl at raðfesta og at halda ásettar freistir
- ert framtøkin
- arbeiðir sjálvstøðugt, hevur lætt lyndi og sært tað skilagóða í broytingum
- dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga

### Lønar-og setanartreytir:

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum og lønt í mun til útbúgving og royndir.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Mariu á Dul, starvsfólkaleiðara, á tlf. 34 55 92 ella við at senda teldupost til mad@trygging.fo.

Starvið skal setast skjótast til ber, men bíðað verður gjarna eftir rætta umsøkjaranum.
Umsóknarfreistin er 24. juni 2008 kl. 12.00.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella umvegis www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*